# Mangur føroyingur stendur púra býttur



- Politikararnir gloyma at siga, hvat teir hava rakað til sín sjálvs. Nú skulu vit bæði betala okkara egnu pensjón og harafturat skulu vit betala pensjónina hjá politikarunum, segði Ingeborg Vinther

*- Spurningurin er, um teir, ið ráða fyri borgum, ikki hava skomm skapta í sær, tí eg haldi ikki, at nakrir veljarar í Vesturevropa hava verið fyri slíkum ósmædni frá sínum fólkavaldu, sum vit hava verið fyri hetta seinasta árið, sigur Ingeborg Vinther*

ÁKI BERTHOLDSEN

- Spurningurin er, um teir, ið ráða fyri borgum, ikki hava skomm skapta í sær.

Á aðalfundinum í Føroya Arbeiðarafelag legði formaðurin, Ingeborg Vinther, ikki fingrarnar ímillum, tá ið hon segði sína meining um ymisk viðurskifti í samfelagnum, sum hon helt hevði eina viðmerking uppiborna.

Og sum vant á aðalfundinum nam hon við nøkur av teimum málum, sum eru frammi í samfelagnum í løtuni og hesuferð, varð tað ikki óvæntað fullveldismálið og førdi fíggjarpolitikkurin í kjalarvørrinum á tí, sum hava tendrað formannin í Føroya Arbeiðarafelag.

- Í hesum tíðum verður samráðst við danir um lagnuna hjá okkara lítlu tjóð. Samgongan hevur sett sær sum mál at loysa frá Danmark, tí vit skulu klára okkum sjálv, segði Ingeborg Vinther.

- Tað er alt gott um tað, at vit gerast sjálvbjargin fíggjarliga, um hetta ber til.

- Kortini stendur mangur føroyingur púra býttur og spyr seg sjálvan, hvat teir, ið ráða fyri borgum, meina. Ella hava teir onga skomm skapta í sær, tí eg haldi ikki, at nakrir veljarar í Vesturevropa hava verið fyri slíkum ósmædni frá sínum fólkavaldu, sum vit hetta seinasta árið, segði Ingeborg Vinther.

### Egnu lønir og pensjónir upp

Formaðurin í Føroya Arbeiðarafelag segði, at áðrenn vit fóru til samráðingar seinasta ár, hækkaðu tinglimir sínar egnu lønir 60 prosent — umframt at teir góvu sær sjálvum pensjónir og aðrar skattafríar ágóðar.

- Hetta gjørdi samgongan samstundis sum hon segði, at fakfeløgini máttu vísa hógv í lønarkrøvum sínum, tí búskapurin toldi ikki stórar lønarhækkingar.

Hon segði, at nú kom so løgmaður við uppskoti fyri alt landsstýrið um at hækka pensjónir teirra við upp til 70%, so teir, ið hava verið longst í landsstýrinum, koma upp á góðar kr. 26.000 um mánaðin í pensjón.

- Eru hesi fólk so nógv meira verd enn aðrir pensjónistar, ið hava verið verkafólk og fiskimenn, og gjøgnum alt sítt arbeiðslív hava verið við til at bygt hetta samfelag upp? Spurdi Ingeborg Vinther.

Hon helt, at tað var ótrúligt, at tey komdu sær slíkt mótvegis veljarafjøldini. Hon hugsaði eisini um tað, sum fólkaflokkurin hevur trýst á í nógv ár, nevniliga at fáa tað, teir rópa eina fólkatrygd, har tey vælbjargaðu skulu fáa eina stóra pensjón og tey lágløntu eina lága pensjón.

- Nú er líkt til, at hetta uppskotið vinnur frama. Vit skulu øll tvingast til at gjalda okkara egnu pensjón, og um tað so eydnast við samráðingum at fáa arbeiðsgevaran at gjalda ein part, má so arbeiðsmarknaðurin berjast um. Men í øllum førum skulu 10% av lønini gjaldast til pensjónsgrunnin hjá Helenu Dam á Neystabø og Óla Breckman. Vit skulu sjálv gjalda okkara egnu pensjón, fyri at nýta orðini hjá almanna- og heilsumálaráðharranum. Landsstýrismaðurin segði, at tey, ið hava høga lívsløn, fáa høga pensjón, og tey, ið hava lága lívsløn, fáa lága pensjón. Men so var eitt slag av fátækrakassa við síðuna av, haðani tey, sum fingu tað lágu pensjónini, kundu fáa nakrar krónur úr.

- Hetta vil sostatt siga, at lønmóttakarin fyrst skal gjalda sína egnu pensjón og og síðani skal hann gjkalda pensjónina hjá okkara fólkavaldu, tí teir kunnu bara gera eina lóg, ið gevur teimum sersømdir fram um allar aðrar borgarar.

- Skiljið tað, hvør ið vil, men hetta hevði neyvan gingið nakra aðrastaðni enn bara í Føroyum, men fólkið, ið býr her á klettunum, er alt ov tolið við politikarar sínar, segði Ingeborg Vinther.

Hon minti eisini á, hvussu pensjónistar okkara vórðu viðfarnir beint fyri jól, tá ið teir onga pensjón fingu. Hon seg minti eisini á støðuna hjá avlamispensjónistunum.

- Teir skuldu fáa hægri pensjón, men ístaðin fingu eina stóra skattarokning, bert tí, at lógirnar vóru skundaðar ígjøgnum.

Ingeborg Vinther helt, at hetta mátti sigast at vera sera illa arbeitt.

- Segði ikki tingformaðurin, at teir máttu fáa lønarhækking í Løgtinginum til tess at gera eitt betri lógararbeiði?

Hon helt nú ikki, at støðan varð blivin stórt frægari, tí hon ásannaði, at á mongum økum í samfelagnum ræður eitt satt óskil.

### Í skeljasori

Ingeborg Vinther helt lítið um tað, ið hon kallaði reypað um, at heilar 750 mill. kr. eru í avlopi í landskassanum fyri árið í fjør, og bert 300 mill. kr. eru nýttar av blokkinum.

- Men samgongan gloymir at taka tað við, sum teir hava rakað til sín sjálvs. Teir gloyma eisini at siga Føroya fólki, at landssjúkrahús okkara er í skeljasori av sparingum. Eitt nú steingja fleiri deildir í summar, samstundis sum mangt annað eisini liggur í vanrøkt.

- Teir siga heldur ikki, at nú gjara teir út aftur úr landskassanum til reiðarar, ella, hvat tað kostar at fáa strandfaraskipini í fullgóðan stand, ella nær tey verða skift út.

- Kortini smæðast teir ikki fyri at klandrast við fakfeløgini um, hvør skal gjalda karensdagarnar hjá teimum, ið koma undir dagpeningaskipan. Og hvussu við barnsburðargrunninum? Spurdi hon. Skal løntakarin eisini gjalda hann?

### Lítið eftir

Formaðurin helt, at Lítið verður eftir av teimum 750 mill. krónunum, tá alt tað, ið liggur sum ein landaskomm í dag, skal gjaldast, serliga, tá hugsað verður um Landssjúkrahúsið.

- Hildið kundi verið fram at nevnt alt tað, ið tørvur er á at fáa gjørt nakað við í landshúsarhaldinum. Er so nógvur peningur, at alt flýtur yvir, so skuldu teir lagt fyri við at lætt um hjá húsarhaldunum við t.d. at tikið oljuavgjaldið av. Tað hevði gjørt stóran mun hjá teimum lágløntu og pensjónistum.

Hon segði, at allar tær kanningar, ið gjørdar eru, vísa, at tá ein milliard fer úr búskapinum, verður arbeiðsloysi, lønarlækking, fráflyting, og lívskorini versna munandi.

- Tað fer ikki at bera til, at allir búskaparfrøðingarnir, ið gjørt hava kanningarnar, fara skeivir. Men vit fáa einki at vita, hvat kemur í staðin, men bert, at onnur skulu gjalda fyri okkum. Tá man skommin vera fullkomin fyri eitt land, ið skal klára seg sjálvt, segði Ingeborg Vinther.

Og so reisti hon spurningin um, hvat fakfeløgini fara at gera, tá ið vit aftur koma í kreppu við teimum avleiðingum, tað hevur við sær, eitt nú fráflyting og lønarlækking?

- Skulu vit bara lata standa til? Ella skulu vit siga, at vit vilja ikki eina ferð aftrat fara gjøgnum arbeiðsloysi og sosiala neyð. Eitt er vist, at eitt so lítið land sum Føroyar tolir ikki fleiri fráflytingar og fylgjur, ið av tí standast.

- Ásannast má, at politikarar okkara hava sætað sær sjálvum bæði væl og virðiliga. Sektina leggja teir á, hvat hendir tí vanliga fólkinum, segði Ingeborg Vinther.

### Sterk feløg neyðug

Formaðurin í Føroya Arbeiðarafelag sigur, at tað er er greitt, at neyðugt er við sterkum fakfeløgum, ið samstarva og fylkja seg.

- Sum hetta samfelagið sær út í dag, so økist stættamunurin ímillum tey lágløntu og háinntøkurnar, samstundis sum arbeiðsloysið er stórt á summum útjaðaraøkjum.

- Líkt er til, at vit fáa amerikanskar tilstandir, tí brúkarin skal sjálvur gjalda alt meir. Men hetta er ikki ein gongd, vit sum fakfelagsfólk vilja hava. Vit eiga at stríðast ímóti øllum stættarmuni og stríðast fyri, at samfelagið er so solidariskt sum gjørligt.

- Jú, sanniliga er brúk fyri fakfeløgunum at gera vart við órætt og misnýtslu av tí, ið øll eiga sín part av. Allar hesar avbjóðingarnar, og tær, sum fara at koma ger tað neyðugt við sterkum fakfeløgum. Latið okkum tí standa saman um felag okkara og í góðum felagsanda samstarva fyri eini ljósari framtíð, limum og fólki okkara at frama, nú farið er inn í eina nýggja øld, er boðskapurin frá formanninum í Føroya Arbeiðarafelag.

*- Tað nyttar lítið at reypa av, at 750 milliónir leypa av á fíggjarlógini, samstundis, sum Landssjúkrahúsið, Strandferðslan og mangt annað, liggur í skeljasori, segði Ingeborg Vinther á aðalfundinum í Føroya Arbeiðarafelag um vikuskiftið*







*Stjórnin í Føroya Arbeiðarafelag er nú hendan: F.v. Kári Jacobsen, Elias Hansen, Margretha Rasmussen, Leila Zachariassen, Ingeborg Vinther, Georg Hansen og Marius Clementsen*

# Nýggj fólk í stjórnina í Føroya Arbeiðarafelag

*Tveir nýggir limir eru í stjórnini í Føroya Arbeiðarafelag, sum hevði aðalfund um vikuskiftið*

ÁKI BERTHOLDSEN

Fólkið var av tí mesta á aðalfundinum hjá Føroya Arbeiðarafelag um vikuskiftið. Av teimum 40 feløgunum, sum eru limir í Landsins størsta Fakfelagi, høvdu tey 36 sent umboð til aðalfundin, sum varð settur fríggjamorgunin klokkan 10 og helt fram allan dagin, til hann varð niðurlagdur um fimm tíðina. Men veðrið var av tí ringa og tað var orsøkin til at í hvussu so er okkurt felag ikki fekk møtt, tí tað var ikki tespuligt at fara til Havnar fríggjadagin, helst hjá teimum, sum skuldi sigla.

Klokkan 10 leygarmorgunin varð aðalfundurin tikin uppaftur og hann helt á, líka til klokkan trý, tá ið ein vælnøgdur formaður takkaði fundarfólkinum fyri ein góðan og siðiligan fund.

Tilsamans høvdu tey 36 feløgini sent eini 130 umboð til aðalfundin, og tað er av tí nógva.

Men at framburður er í landinum, sæst eisini í talinum av arbeiðsfólki, sum eru limir í Føroya Arbeiðarafelag. Øll tey 40 lokalu verkamannafeløgini, sum eru limir í Føroya Arbeiðarafelag, høvdu tilsamans 6.237 limir á nýggjárinum. Í 1998 høvdu tey 5.824 limir, sostatt eru 413 limir fleiri í Føroya arbeiðarafelag nú, enn tað vóru fyri einum ári síðani.

Feløgini, sum ikki vóru umboðað á fundinum hesuferð, vóru feløgini í Nólsoy, Hvalvík, Fámjin og Drósan á Tvøroyri.

### Tveir nýggir limir

Á fundinum vóru nakrar lógarbroytingar gjørdar, men tær vóru mest av tekniskum slag og koma ikki at ávirka viðurskiftini hjá tí einstaka liminum.

Men tað komu eisini tveir nýggir limir í stjórnina í Føroya Arbeiðarafelag.

Fýra nevndarlimir stóðu fyri afturvali: Símun Abrahamsen í Fuglafirði, Tana Kallsoy av Eiði, Marius Clementsen av Sandi og Georg Hansen úr Miðvági.

Tana Kallsoy boðaði frá, at hon tók ikki við afturvali, tí nú var hon komin so mikið upp í árini at hon helt, at onkur annar átti at sleppa framat.

Marius Clementsen og Georg Hansen vóru afturvaldir, men nývaldir í stjórnina vóru Margretha Rasmussen úr Fuglafirði og Leila Zachariassen úr Havn, formaður í S & K.

Næstformaðurin, Elias Hansen av Skála stóð eisini fyri vali, og hann varð eisini afturvaldur.

Stjórnin í Føroya Arbeiðarafelag er sostatt soleiðis mannað nú: Ingeborg Vinther, formaður, Elias Hansen, næstformaður, Georg Hansen, Marius Clementsen, Leila Zachariassen, Margretha Rasmussen og Kári Jacobsen, hann er úr Vági. Tiltakslimir eru nú Jógvan Heinesen úr Lorvík og Harry Benjaminssen úr Fuglafirði, sum báðir eru nývaldir og Karla Einarsson úr Runavík, sum er afturvald.



*Fráfarandi stjórnin er hendan: Frá vinstru, Elias Hansen, Kári Jacobsen, Georg Hansen, Símun Abrahamsen, Marius Clementsen, Tana Kallsoy og Ingeborg Vinther*

## TIPS 13 úrslit

**Vika 12**
**25.–27. mars**

| | |
|---|---|
| 1. Aston Villa–Derby | 1 |
| 2. Bradford–Manchester U. | 2 |
| 3. Chelsea–Southampton | X |
| 4. Liverpool–Newcastle | 1 |
| 5. Middlesbrough–Sheffield W. | 1 |
| 6. Sunderland–Everton | 1 |
| 7. Watford–Tottenham | X |
| 8. Bolton–Port Vale | 1 |
| 9. Crystal Palace–Charlton | 2 |
| 10. Ipswich–Fulham | 1 |
| 11. Manch. C.–West Bromwich | 1 |
| 12. Nottingham F.–Blackburn | 2 |
| 13. Queebs P. R.–Norwich | X |

**Prognosa**

| | |
|---|---|
| 13 røtt: | 2.953,- kr. |
| 12 røtt: | 118,- kr. |
| 11 røtt: | 13,- kr. |
| 10 røtt: | 0,- kr. |

Sosialurin tekur onga ábyrgd av møguligum villum

## TIPS 12 úrslit

**Vika 12**
**25.–27. mars**

| | |
|---|---|
| 1. AaB–OB | 2 |
| 2. AB–Silkeborg | 1 |
| 3. AGF–Herfølge | 2 |
| 4. Brøndby–Lyngby FC | X |
| 5. Vejle–FC København | 2 |
| 6. Viborg–Esbjerg | 2 |
| 7. Farum–Svendborg | 1 |
| 8. Fredericia–Ølstykke | 2 |
| 9. Haderslev–Hvidovre | X |
| 10. Helsingør–Vejen | 2 |
| 11. Næstved–Skive | 1 |
| 12. Holstebro–Glostrup IF 32 | 2 |

**Prognosa**

| | |
|---|---|
| 12 røtt: | Eingin vinnari |
| 11 røtt: | 18.038,- kr. |
| 10 røtt: | 1.275,- kr. |

Sosialurin tekur onga ábyrgd av møguligum villum

**Vika 12 – 25. mars**

Jokaratal: **6-6-6-4-3-5-7**

| | |
|---|---|
| 7 røtt: | Eingin vinnari |
| 6 aftastu røtt: | Eingin vinnari |
| 5 aftastu røtt: | 23.057,- kr. |
| 4 aftastu røtt: | 2.574- kr. |
| 3 aftastu røtt: | 265,- kr. |
| 2 aftastu røtt: | 52,- kr. |

Sosialurin tekur onga ábyrgd av møguligum villum

**LOTTO**

**Vika 12 – 25. mars**

Vinnaratøl: **03 - 12 - 16 - 19 - 25 - 34 - 36**
Eykatøl: **02 - 33**

| | |
|---|---|
| 7 vinnaratøl: | 2.065.375,- kr. |
| 6 vinnarat.+1 eykat.: | 85.551,- kr. |
| 6 vinnaratøl: | 4.081,- kr. |
| 5 vinnaratøl: | 172,- kr. |
| 4 vinnaratøl: | 40,- kr. |

Sosialurin tekur onga ábyrgd av møguligum villum

**DUSINO**

**Vika 12 – 26. mars**

Vinnaratøl: **01 - 02 - 04 - 05 - 08 - 13 - 14 - 17 - 18 - 20 - 21 - 22**

| | |
|---|---|
| 12 í sama punti: | Eingin vinnari |
| 11 í sama punti: | 3.489,- kr. |
| 10 í sama punti: | 116,- kr. |
| 9 í sama punti: | 26,- kr. |

Sosialurin tekur onga ábyrgd av møguligum villum

## VALUTAKURSIR

| | | 27.03.00 | Ultimo februar |
|---|---|---|---|
| USA | Dollarar | 762,9900 | 764,6400 |
| Bretland | Pund | 1219,7900 | 1219,3200 |
| Týskland | Markur | 380,7500 | 380,7900 |
| Svøríki | Króna | 89,3200 | 88,2700 |
| Noreg | Króna | 91,6800 | 92,1300 |
| Frakland | Frankur | 113,5300 | 113,5400 |
| Belgia | Frankur | 18,4600 | 18,4620 |
| Sveits | Frankur | 468,7900 | 463,5600 |
| Holland | Gyllin | 337,9200 | 337,9600 |
| Italia | Liri | 0,3846 | 0,3846 |
| Finnland | Markur | 125,2500 | 125,2600 |
| Ísland | Króna | 10,4300 | 10,4800 |
| Eysturríki | Skillingur | 54,1180 | 54,1240 |
| Spania | Pesetas | 4,4760 | 4,4760 |
| Portugal | Escudos | 3,7140 | 3,7150 |
| Kanada | Dollari | 522,0300 | 526,3300 |
| Grikkaland | Drakmur | 2,2280 | 2,2300 |
| Japan | Yen | 7,1241 | 6,9532 |
| Írland | Pund | 945,5500 | 945,6500 |
| | Evra | 744,6800 | 744,7600 |

FØROYA SPARIKASSI